# TWR – *KVINNUR VIÐ VÓN*

# Bønaráheitanir fyri juni 2024 - Asia

1. Harri, tað eru mong, ið framvegis hvørki duga at lesa ella skriva í Vietnam. Vit biðja, at kvinnur í hesum menningarlandi fáa fleiri møguleikar at læra seg at lesa og skriva. (Nehemias 8:8)
2. Gud, vit biðja, Teg geva trúartænastutoymi okkara í Kambodja vísdóm og skynsemi, so tey kunnu taka gudgivnar avgerðir. Lat tey elska, eggja og styrkja hvørt annað og vera ljós í sínum samfelag. (Jóhannes 13:35)
3. Vit takka Tær, Harri, fyri fíggjarligar stuðlar og fyri radiosamband frá KTWR á fjarlagda Guam og 80 lokalum útvarpsstøðum, ið ger tað møguligt hjá milliónum av indonesiskum kvinnum at hoyra Orð Guds og fáa frálæru í ymiskum, ið hevur við kvinnur at gera. (Seinna Korintbræv 9:6-7)
4. Gud, vit biðja, at kvinnur í Nepal fáa fleiri møguleikar at vinna pening, harímillum reiðiliga starvsetan og íverksetan, so tær kunnu verða fíggjarliga óheftar. (Orðtøkini 31:8-9)
5. Faðir, gev, at frálæra fer fram í Mongolia um sannleika Tín viðvíkjandi hjúnalagnum. Lær menninar at elska og virða konur sínar, og kvinnurnar at virða menn sínar og vera teimum undirgivnar. (1. Pætursbræv 3:1-7)
6. Harri, uppihalt og ugga einligar mammur á Filipsoyggjunum, ið arbeiða hart fyri at nøkta tørvin hjá børnunum. (Esaias 41:13)
7. Harri, vit biðja fyri kvinnum í Pakistan, at tær kunnu koma undan happing á arbeiðsplássum, vánaligum arbeiðsumstøðum og lágum lønum, ið ger, at tær ikki kunnu verä verandi í starvinum. (Orðtøkini 22:2)
8. Faðir, vit biðja fyri næmingum í Norðurkorea, ið eru vorðnir kristnir, meðan teir hava lisið uttanlands. Varðveit teir, tá ið teir koma heimaftur, og nýt teir at umbroyta Norðurkorea. (Josva 1:9)
9. Gud, gev stjórnini í Papua Ný Guinea vísdóm, sum hon stríðist móti yvirgangi og støðuloysi. Lat tað verja kvinnur ímóti harðskapi, ið hevur verið vaksandi. (Orðtøkini 2:6)
10. Harri, verj og uppihalt familjum í Myanmar, ið eru ávirkaðar av áhaldandi hernaðarligum bardøgum og náttúruvanlukkum, ið tíðum koma fyri. (Nahum 1:7)
11. Gud, broyt umstøður í India, ið eru við til, at ikki einans ung gevast í skúlanum, men eisini at fleiri gentur enn dreing doyggja. (Orðtøkini 18:15)
12. Faðir, ein stórur meirilutið av japanesum trúgva ikki á Teg, men trúgva heldur á gudarnar í shintoismuni. Send eina stóra veking um alt Japan, har fólk venda við og trúgva á Teg. (Esaias 45:5-6)
13. Harri, broyt hjørtu á menniskjum, so lógir í Malaisia kunnu broytast. Lat ein enda fáaast á barnagiftum og harðskapi vegna kyn, og ger at øll verða líka lønt. (Filippibrævið 2:13)
14. Harri, vit biðja fyri kvinnum í Afganistan, ið ikki hava loyvi at arbeiða, fara í skúla ella fáa almenna tænastu, ger at tær kunnu fá rættindi síni aftur. (1.Mósebók 16:13)

15. Nærum 20% av íbúgvunum í Kina eru yvir 60 ár. Faðir, vit biðja fyri sálarligu heilsuni og vælveruni hjá eldru kvinnum í Kina. (Sálmur 42:12 - ensk: 42:11)
16. Gud, gev teimum trúgvandi í Singapore kraft at ganga fram í ríki Guds og finna styrki og gleði í Tær hóast trupulleikar. Gev teimum tað, teimum tørvar. (Jákupsbræv 1:2-4)
17. Takkið Harranum, fyri at nógvar kvinnur í Vietnam nú kenna Jesus, eftir at tær hava lurtað eftir Kvinnur við Vón, og ásanna, at tær eru dýrabarar í eygum Hansara. (Esaias 43:4)
18. Faðir, hjálp hjúnafeløgum á Filipsoyggjunum at læra at samskifta væl, so at hjúnabandið kunnu styrkjast. Set menn, ið drekka, í frælsi, og varðveit konurnar, ið uppliva harðskap. (Sálmur 50:5)
19. Harri, varðveit kvinnur í Nepal frá harðskapi og mismuni, og lat tær kenna seg tryggar. Lat tær finna stimbrandi sambond, ið hjálpir teimum kensluliga og sálarliga. (Sálmur 91:4)
20. Styrk trúgvandi mammur og ommur í Mongolia í trúnni og vitnisburðinum, sum tær vegleiða børnini og ommubørnini eftir Bíbliunnar meginreglum (Seinna Timoteusarbræv 1:3-5)
21. Matvøruprísirnir hækka nógv í Indonesia, og fátækar familjur stríðast við at keypa mat. Gud, vilt Tú nøkta dagliga tørv teirra, so hesar familjur ikki ganga svangar. (Filippibrævið 4:19)
22. Harri, barnloysi er ein stórur trupulleiki hjá kvinnum í Pakistan, tí biðja vit Teg um at signa tær við børnum. Lat gentubørn verða vælkomin og ikki roknað sum ein byrða. (Sálmur 127:3)
23. Faðir, nú øgiligur vøkstur er á harðskapi millum pør í Suðurkorea, lat menn læra at virða kvinnur, og lat Orð Títt umbroyta teirra vreiði og harðskapslyndi. (Rómbrævið 12:2)
24. Harri, gev kvinnum í Kombodja fíggjarligan tryggleika gjøgnum størv, arbeiðsroyndir og rímiliga løn. Hjálp teimum at nýta peningin skilagott. (Prædikarin 7:11-12)
25. Faðir, vit biðja um tryggleika fyri kvinnur í India, ið eru sárbarar fyri brotsverkum, serstakliga á almennum støðum s.s. tunnlum og oydnum vegum. (Esaias 25:4)
26. Gud, hjálp jarðskjálvtaoffrunum á Noto hálvoynni í Japan. Hjálp kirkjum og samkomum at tæna teimum bæði tímiliga og andaliga, so tey kunnu verða frelst. (Sálmur 121:1-2)
27. Vit prísa Tær, Harri, fyri felagsskapin við Wantok Radio Light í Papua Ný Guinea. Lat Heilaga Andan nýta Kvinnur við Vón sendingarnar at styrkja lurtarar, ið stríðast við freisting. (Matteus 26:41)
28. Gud, veit kvinnum í Afganistan, ið hava mist familjulimir og ognir í jarðskjálvtanum í 2023, frið og heilsubót. (Filippibrævið 4:7-9)
29. Harri, styrk og varðveit kvinnur í Kina, ið hava upplivað likamligan og sálarligan harðskap frá hjúnafelagnum. Lat løgregluna gevast við at viðgera innanhýsis harðskap sum eitt familjumál. (Seinna Sámuelsbók 22:49)
30. Himmalski Faðir, signa fyrireikingarnar hjá TWR *Kvinnur við Vón* toyminum í Malaisia at fáa til vega persónligt reinføristilfar at lata ókeypis til tær kvinnur, ið ikki hava ráð til slíkt. (5. Mósebók 15:7-8)

***“Høvuðsstuðulin í øllum kristiligum arbeiði er bøn”*** ***(Eeva Vähäsarja)***

# TWR – *KVINNUR VIÐ VÓN* - *Juni 2024*

# At skapa eina betri framtíð

### eftir Paulinu Wulansari, samskipara í landsynnings Asia

Tá ið tú, gevur einari kvinnu frálæru, fær næsta ættarlið gagn av tí. Ein kvinna, við góðari skúlagongd, kann vera betri fyri at halda hús, taka avgerðir, hækka livistøðið hjá familjuni, skapa størv og broyta samfelagið. Allar kvinnur hava rætt til skúlagongd. Tíverri hava milliónir av kvinnum í Asia ikki henda møguleika orsakað av fátækdømi, sosialum stættarmuni, mismuni ella tí tær hava ikki umstøður og ráð til tað ella vantandi fígging.

Í suður Asia eru gentur í vanda fyri at verða álopnar og skaddar, burturfluttar, og enntá at verða dripnar á veg í skúla, og tær eru heldur ikki tryggar í skúlanum. Úrslitið er, at mangar gentur velja at fara úr skúlanum, tá ið tær koma í tannárini. Gentur, ið búgva langt frá skúlanum eru í serliga viðbreknari støðu; longri tær mugu ganga til skúlan, og meira fjarskotin bústaðurin er, størri er vandin.

Í landsynnings Asia hava nógvar kvinnur onga skúlagongd, tær duga hvørki at lesa ella skriva, og tær liva undir fátækramarkinum. Tær mugu arbeiða fyri at breyðføða familjuna, men har er ikki nógv størv at velja ímillum – tær arbeiða mest við at selja mat, sum arbeiðiskonur á bóndagørðum, og sum húshjálp við sera lítlari løn. Hesar kvinnur duga ikki væl at taka sær av familjuni, tær vita ikki hvønn týdning føðslugóður matur, reinføri ella skúlagongd hevur í uppalingini av børnunum.

Gjøgnum *Kvinnur við vón* sendingar, kunnu kvinnur, sum eru umringaðar av vónloysi, ótta og fátækradømi, kortini læra, hvussu tær kunnu vinna á hesum forðingum við persóninum Jesusi Kristusi. Radio ger, at milliónir av kvinnum kunnu lurta eftir Orði Guds á sínum hjartamáli.

Toymir okkara hjálpa kvinnum gjøgnum yrkisligar venjingarskráir, ið geva kvinnum kunnleika í seyming, handverki og jarðarbrúki, sum ger tær førar fyri at skapa inntøkur og betra liviumstøðurnar. Lesi- og skriviflokkar, kunnleiki um heilsurøkt og ráðgevingar tænastur gera eisini kvinnur førar fyri at taka skilagóðar avgerðir fyri sær sjálvum og familjum sínum.

Kortini hava kvinnur í landnyrðings Asia nógvar møguleikar at fáa skúlagongd. Sjálvt í Mongolia er skúlagongd hjá kvinnum á nógv hægri stigi enn hjá monnum, tó eru trupulleikar enn har. Tá ið lærdómsstøðið hjá kvinnum hækkar, gerst stríðið um uppfatan av henni og kynsbýti við menn í samfelagnum sterkari, har serstakliga stakar kvinnur uppliva harðasta stríðið. Tí vil TWR *Kvinnur við Vón* í landnyrðings Asia hjálpa hvørjum persóni at liva í samljóði við vilja Guds, sum skapti menn og kvinnur í mynd Sínari. Vit vilja eggja kvinnum til at liva eftir ætlan Guds viðvíkjandi hjúnalagi og familju.

Biðið, at við hjálp frá *Kvinnum við Vón*, kunnu kvinnur í Asia vinna á avbjóðingum og skapa eina betri framtíð fyri seg sjálvar, familjur sínar og samfelagið. Gævi, at trúgv teirra á Jesus Kristus gerst sterkari dag frá degi.

## Undirvísa, lívga, útgera kvinnur til at læra, biðja, lurta, vaksa og geva

*KVINNUR VIÐ VÓN*

***twrwomenofhope.org***

## Fíggjarstuðul:

**EvR (Evangeliska Røddin) hevur konto í Betri Banka nr. 9181 000 533 7145 til at flyta pening tilskilað til TWR (Trans World Radio).**

**Allur stuðul, sum kemur inn á hesa konto fer óskerdur til arbeiðið hjá TWR.**

**TWR PO Box 12, 82002 Bratislava 22 – Slovakia — twre@twr.org**